


# KT-LEIÐARI

## Statoil Føroyar søkir eftir leiðara til KT-økið

### Starvið
Sum KT-leiðari stendur tú á odda fyri øllum KT-økinum hjá Statoil Føroyar. Tú hevur evstu ábyrgd av KT-skipanum okkara og fert at leiða krevjandi KT-verkætlanir, sum eru fyri framman.

### Arbeiðsuppgávur
Sum KT-leiðari hevur tú fjølbroyttan dag. Nakrar av uppgávunum eru at:

- Menna KT-økið, so at arbeiðsgongdir og skipanir á besta hátt stuðla dagliga arbeiðinum hjá starvsfólki okkara.
- Leiða og skipa KT-verkætlanir.
- Menna, reka og viðlíkahalda KT-skipanir.
- Vera við í KT-toymum hjá Statoilsamtakinum.
- Samskipa raksturin av KT-kervinum við aðrar partar av Statoilsamtakinum.
- Tryggja, at KT-kervið lýkur altjóða krøv hjá Statoilsamtakinum.

### Deildin
Tú fert at leiða KT-deildina, sum er partur av fíggjardeildini hjá P/F Statoil Føroyar. Tú fært starvsfólkaábyrgd og verður partur av leiðslutoyminum á fíggjardeildini.

### Tínir førleikar
Tú dugir av øllum at leiða eitt arbeiði, hevur álit millum fólk, virðir tey og fært tey við tær. Tú hevur ein eldhuga fyri krevjandi avbjóðingum, snávar ikki í skeivari løtu og missir ikki málið úr eygsjón. Tær dámar eisini væl at fara undir nýmótans mannagongdir og hevur treiskni og dugnaskap til at fullføra tær.

Tú hevur KT-útbúgving og arbeiðsroyndir til at greiða yrkisliga partin av arbeiðinum. Hægri útbúgving er fyrimunur. Orðið er eisini ein av styrkjum tínum, bæði skrivliga og munnliga, og enskt dugir tú væl.

### Vit bjóða tær
Eitt áhugavert og spennandi starv, sum gevur tær góðar møguleikar fyri persónligari og yrkisligari menning. Statoilsamtakið raðfestir KT-økið sera frammarlaga, og arbeiðið verður ofta skipað í samstarvi við toymi, ið virka tvørtur um landamørk. Tær stendur eisini í boði at vera við á skeiðum innanlands sum uttanlands, bæði hjá Statoilsamtakinum og øðrum.

Lønin verður ásett eftir royndum og útbúgving. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Sverra Kallsberg, fíggjarleiðara, tlf. 34 35 00.

### Umsóknir
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. desember 2006. Stíla umsóknina til:

P/f Statoil Føroyar
Postboks 3098
FO 110 Tórshavn
att.: Sverri Kallsberg
ella send teldubræv til: FRSK@Statoil.com

Umsókn tín verður viðgjørd í trúnaði.

*Endamálið hjá Statoil Føroyar er at veita brúkarum í Føroyum oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða umleið 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av fremstu málum okkara.*

**STATOIL**

*– fyri viðskiftafólk okkara*

REPROZ



PRÍSIR ÚR EINANS KR. 2.893,-

# SKÍÐFERÐ VIÐ EGNUM BILI

## BEINLEIÐIS VIÐ BILI ÚR TÓRSHAVN TIL NORSKU SKÍÐFJØLLINI

Gloym alt um stress, væl stúvaðar bussar, knarrut børn og taskurok. Pakkið børnini, viðførið og góða lagið í bilin heima í túninum, koyr umborð á Norrönu, njótið túrin umborð og koyrið vælúthvíld í land í Bergen – klár til eina frálíka familiuferiu.

**HEMSEDAL: 4 í bili, fyri hvønn úr bert kr. . . . . . . . . . . . 2.893,-**
**Íroknað prísin er:** Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari við wc/bað innv. Hartil uppihald í 7 nætur á Fanitullen Apartment í Hemsedal og 2 nætur á Incity Apartments í Bergen á út- og heimferðini. Oljuavgjald er íroknað kostnaðin. Avgeiðslugjald á kr. 60,- fyri hvønn ferðandi er ikki íroknað. Tilboðið er galdandi frá 13.01-25.01.2007. Aðrir prísir eru galdandi 26.01-30.03.2007.

**VOSS: 4 í bili, fyri hvønn úr bert kr.. . . . . . . . . . . . . . . . . 3.178,-**
**Íroknað prísin er:** Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari við wc/bað innv. Hartil uppihald í 9 nætur á Fleischers Apartment í Voss. Oljuavgjald er íroknað kostnaðin. Avgeiðslugjald á kr. 60,- fyri hvønn ferðandi er ikki íroknað. Tilboðið er galdandi frá 13.01-14.03.2007. Aðrir prísir eru galdandi 15.03-30.03.2007.

J. BRONCKS GØTA 37 · P.O. BOX 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL +298 34 59 00 · FAX +298 34 59 50 · BOOKING@SMYRIL-LINE.FO

SMYRIL LINE – EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

WWW.SMYRIL-LINE.FO

**Áhugaverdar heimasíður:**
www.fanitullen-hotell.com
www.hemsedal.com
www.fleischers.no
www.visitvoss.no
www.incity.no

**HEMSEDAL:**
Royni t.d. »norsku alpurnar«
Hemsedal 5 tímar frá Bergen.
Njótið frálíku náttúruna, hugnaligu matstovurnar, kavan og sólina.
Hemsedal hevur kavagaranti og ein av bestu skíðdeplunum í Europa.

**VOSS**
Einans 2 tímar frá Bergen við skíðbreytum fyri børn og vaksin.
Kavagaranti, góðar liftir, hugnaligar matstovur og aktivitetir fyri stór og smá. Serlig tilboð til børn eru eisini á staðnum.